# Rosalie farin av landinum

**Rosalie Thomsen, sum er víst úr Føroyum, er nú farin av landinum. Hon hevur karantenu ímóti at vísa seg í Føroyum tað næsta árið, og tí er familjan Thomsen skild sundur. Mamman og børnini eru í Danmark, meðan pápin arbeiðir í Føroyum**

ÚTVÍST
*Ingi Rasmussen*

Rosalie Thomsen og hennara tvey børn eru farin úr Føroyum.

Tað upplýsir maður hennara, Heine Thomsen, sum hon hevur verið gift við í átta ár.

Rosalie Thomsen hevur filipinskt pass, men hevur fingið varandi uppihaldsloyvi í Danmar, tí hon er gift Heina Thomsen, sum er danskur ríkisborgari.

Heine er føddur í Føroyum, og tey bæði ætlaðu í fjør at seta seg niður í Føroyum við familjuni. Tey ynsktu, at seks ára gamli sonur teirra, og barnið, sum hon tá bar undir belti, skuldu vaksa uppi í Føroyum.

Men hóast útlendingastýrið í fyrstu atløgu gav munnligt loyvi til, at Rosalie kundi fara til Føroya uttan visum, so var hon seinni víst úr landinum, tí hon ikki hevði arbeiðs- og uppihaldsloyvi.

Hóast hon átti eitt barn á landssjúkrahúsinum í mars, fekk hon boð um at vera av landinum innan 10. apríl, og hesi boðini hevur hon nú aktað. Saman við útvísingini fekk Rosalie Thomsen eisini karantenu ímóti at koma aftur til Føroya í eitt ár.

Nú er ov seint hjá Rosalie Thomsen at søkja um tað uppihaldsloyvið, sum uttan iva hevði givið atgongd til at búð í Føroyum. Sostatt er familjan Thomsen skild sundur. Heine Thomsen er eftir í Føroyum, her hann arbeiðir, men Rosalie og børnini eru í Danmark.

Familjan hevur kært málið um uppihaldsloyvi til rættarhjálpina í Keypmannahavn, men tey vænta sær onki, tí slíkt tekur tíð at viðgera.

# Løgtingið skal standa sína roynd

**Í dag, hósdagin 10. apríl, skal myndugleikin hjá løgtinginum standa sína roynd. Tá kemur uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um avtøku av hernarðarligu revsi- og rættargangslógunum til fyrstu viðgerð.**

POLITIKKUR
*Ingi Rasmussen*

Javnaðarflokkurin fekk týsdagin tær neyðugu undirskriftirnar til vega, so uppskotið at avtaka hernaðarlógirnar, sum stjórnin av sínum eintingum hevur sett í gildi fyri Føroyar, kundi vera lagt fram. 20 tingmenn hava skrivað undir.

Allir flokkar uttan Sambandsflokkurin hava lagt uppskotið fram, men limir úr Sambandsflokkinum hava kortini skrivað undir, at víkt verður frá tíðarfreistini, so uppskotið kann fáa viðgerð.

Uppskotið er lagt fram, tí danska stjórnin setti eina røð av lógum og kunngerðum í gildi í Føroyum ímóti vilja løgtingsins.

– Hetta er sera álvarsamt, sigur Kristian Magnussen úr Javnaðarflokkinum, sum hevur tikið stig til uppskotið.

– Fyri at forða fyri, at hetta mál í 55 ára gomlu søgu heimastýrisins skapar fordømi fyri, at hetta verður vanlig mannagongd frameftir, verður mælt til, at hesar lógir verða tiknar av í stundini. Hervið verður staðfesta tað, sum higartil hevur verið galdandi siðvenja í Føroyum, at eingin ríkislóg fær gildi, uttan at tingið samtykkir tað, sigur Kristian Magnussen í viðmerking til uppskotið.

Roknasat kann við, at uppskotið fær breiða undirtøku, tí tað er sjálvur myndugleikin hjá løgtinginum, sum stendur upp á spæl.

# SARS kann stava frá fugli

**Nógv bendir nú á, at tann herviliga lungnasjúkan SARS er vorðin flutt frá fugli til fólk.**

SJÚKUR
*Árni Joensen*

Granskarar um allan heim royna í hesum døgum at útvega sær allan hugsandi kunnleika til ta nýggju herviligu lungnasjúkuna SARS, sum longu hevur kravt mong mannalív eftir stuttari tíð.

Amerikanskir granskarar siga, at teirra royndir benda á, at SARS-virusið er eitt sokallað coronavirus, og at eginleikar tess líkjast nógv coronavirus hjá fugli. Tí halda amerikansku granskararnir, at tað er ikki óhugsandi, at SARS-virusið upprunaliga stavar frá fugli.

Men enn kenna granskararnir ikki allar eginleikarnar hjá SARS-virusinum. Vanliga elvir coronavirus bert til vanligt krím hjá fólki, men SARS-virusið vísir seg at hava ein øðrvísi arvaeginleika, siga granskararnir, og tí er í grundini talan um eitt higartil ókent virus, hóast læknavísindin kennir nakrar av tess eginleikum.

Flestu granskararnir tykjast á einum máli um, at virusið stavar upprunaliga frá djórum, og at tað er mest sannlíkt, at tað er komið frá fugli. Men granskararnir viðganga samstundis, at tað kann gerast torført at fáa tað endaliga svarið upp á hendan spurningin. Eitt er, at tað er trupult at finna tað fuglaslagið, sum hevur virusið, og so er tað heldur ikki givið, at allir fuglarnir hava virusið í sær. Tað kann væl henda, at talan bert er um nakrar fáar fuglar, og so mikið truplari kann tað gerast at loysa gátuna.

# Guðrun hjálpir krígsofrum

**Saman við fleiri stórum nøvnum skal Guðrun Sólja Jacobsen nú taka lut í konsert, hvørs endamál er stuðla krígsofrum í Irak**

STJØRNA
*Jákup Mørk*

Sanne Salomonsen, Lars H.U.G og Guðrun Sólja Jacobsen eru milum teirra, sum skulu draga fólk til, tá TV2 og DR í næstum skipa fyri stuðulskonsert fyri krígsofrum í Irak.

Hetta er greiða útmeldingin í donskum miðlum, og tá hugt verður at, hvørji onnur nøvn eru við á konsertini, er greitt, at Guðrun er høgt í metum í hesum døgum. Í øllum førum verður hon her roknað fram um annars stór donsk nøvn sum Brødrene Olsen og Sort Sol.

Akkurát, hvussu stórt tiltakið hjá sjónvarpsrásunum verður, er eitt sindur ilt at meta um. Danska Ekstra Blaðið skrivar á netinum, at enn eru ikki serliga nógv atgongumerki seld, og blaðið finst eisini at, at prísurin fyri hesi er so høgur sum 375 kr.

Hetta tykist tó ikki at nerva fyrireikararnar.

– Vit vóna sjávlandi, at talan verður um nøkur túsund fólk. Tey flestu hava ivaleyst skilt, at hetta kvøldið ikki snýr seg um, hvørja støðu tú hevur til kríggið, men um at stuðla teimum ofrum, sum altíð vilja vera í slíkum støðum, sigur Palle Steffensen, sum er samskipari av tiltakinum.



*Føroyuska Guðrun er í løtuni hottari enn eitt nú Brødrene Olsen og Sort Sol. Tað tykjast í øllum førum vera boðini hjá Danmarks Radio og TV2*

# Danmark umboðað í Irak-stýrinum

**Ein danir verður millum teirra, sum skulu stýra Irak ta fyrstu tíðina aftan á kríggið.**

KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen*

Danska stjórnin hevur tilnevnt Henrik Olesen til tað nýggja stýrið, sum skal taka við leiðsluni í Irak, tá kríggið er liðugt.

Henrik Olesen hevur drúgvar royndir frá ymiskum altjóða arbeiði. Hann var umboðsmaður fyri ST í Pólandi, tá Berlinmúrurin fall, og hann var millum teirra, sum løgdu verkætlanina »Mat fyri olju« hjá Irak til rættis. Henrik Olesen hevur fleiri ferðir verið í Irak, har hann hevur tingast við myndugleikarnar um ymsar hjálparætlanir.

Sambært Politiken skal hann í fyrsta umfari standa fyri hjálpararbeiðinum í Irak aftan á keíggið, samstundis sum hann verður bindilið millum donsku stjórnina og amerikansku leiðsluna í Irak.

Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri segði fyrradagin, at danska stjórnin er til reiðar at taka lut í fyribilsstýrinum í Irak, sjálvt um hetta stýrið verður skipað uttan góðkenning úr ST.

# Rúsfríar konsertir á Margarinfabrikkini

KONSERT
*Ingi Rasmussen*

Margarinfabrikkin í Havn skipar javnan fyri tónleikatiltøkum fyri ung. Tað sermerkta er, at øll tiltøk verða hildin í rúsfríum umhvørvi, og tey verða væl vitjað.

Fríggjakvøldið 11. apríl verður konsert fyri ung í aldrinum 12 til 16 ár. Konsertin verður frá klokkan 21 til 24.

Talan er um tveir bólkar og ein DJ. Bólkarnir, ið spæla, eru Paradox og Speaker. Dj Switch er ein nýggjur plátuvendari, ið roynir sínar veingir.

Paradox eru tríggir unglingar, sum spæla rokk í tí harðara endanum, eitt nú Deep Purple og Black Sabbath.

Speaker er sera væl umtóktur bólkur, ið hevur gjørt vart við seg í eitt nú Prix Føroyum. Teir spæla meiri sveimandi rokk og hava spælt á Margarinfabrikkini áður.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Elly og Eivind 60 ára brúdleypsdag



Í dag, hósdagin 10. apríl, eru 60 ár liðin, síðani Elly og Eivind Niclasen í Klaksvík giftust. Eftir so langt lív saman sigur tað seg sjálvt, at tey bæði, sum framvegis eru virkin og løtt upp á sporið, eru væl kendur partur av býarmyndini í Klaksvík. Tey búgva framvegis í húsunum á Gerðareiði, sum tey høvdu latið byggjað og fluttu í, tá ið tey giftust í 1943.

Elly er ættað úr Norðurstovu í Gerðum. Hon er fødd 4. august í 1922 og er dóttur Karl, bónda, og Karolinu, sum var úr Trøllagili. Tey fingu átta børn: Johnhild, Óli, Lena (doyði sum smágenta), Elly, Trinilena, Karl Monrad, Hedvig og Mikkjal. Trinilena býr niðri, og øll hini búsettust í Klaksvík, har eftirkomararnir hjá teimum eru rættuliga nógvir. Óli doyði fyri nøkrum árum síðani.

Eivind er ættaður úr Sørvági. Hann er føddur 16. juli í 1918. Foreldrini vóru Elisabeth og Óli Niclasen . Tey fingu níggju børn: Erik búsettist í Klaksvík, Karl á Tvøroyri, Nikolina í Vági, Lena í Søldafirði, Hjalmar, Jóhannus og Hans Dávid í Sørvági og Ove og Eivind í Klaksvík. Teir einastu, sum eru eftir á lívi, eru Eivind og Hans Dávid, sum á yngri árum búði í Klaksvík.

Elly og Eivind eiga trý børn: Karolina, Ólavur og Ragnar. Karolina og Ólavur búgva í Klaksvík, og Ragnar er trúboðari á Filipsoyggjunum. Hann og familjan eru komin heim at hátíðarhalda stóra dagin hjá foreldrunum.

Eivind kom til Klaksvíkar fyrst undir krígnum. Hann helt til hjá beiggjanum Ova, sum hann trý ár seinni gjørdist granni hjá. Eivind tók motorpassaraprógv og skiparaprógv, og miðskeiðis í fimmti árunum tók hann longdina í Klaksvík.

Í 1947 keypti Eivind saman við beiggjanum Hans Dávidi og Guðleivi Thorsteinsson í Klaksvík útróðrarbátin Barðið. Seinni keypti Eivind partarnar hjá hinum báðum, og hann dreiv sjálvur bátin inntil seinnapartin av fimmti árunum.

Í 1957 lótu Eivind og brøðurnir Hjalmar og Hannus línubátin Vesturvón byggja. Eivind var skipari fyrstu árini. Í seksti árunum var hann í fleiri ár stýrimaður á einum donskum sleipibáti, Sigyn, sum sigldi í Grønlandi.

Í 1969 lótu Eivind, Hjalmar og Hannus fyrsta hekkutrolaran Vesturvón byggja. Hann er síðani útskiftur við ein betri útgjørdan, og nú er reiðaravirksemið økt uppaftur meir

Eivind hevði ábyrgd í reiðarínum, inntil fyri heilt fáum árum síðani. Bæði umborð á útróðrarbátinum, línuskipinum og trolaranum var hann tiltikin røkin og nýtti sítt góða hegni og sínar góðu arbeiðsgávur.

Elly hevur, sum nógv tær flestu føroysku konurnar og mammurnar tá í tíðini, altíð verið heima og ansa manni, børnum og heiminum. Har hevur skinið av hvørjum spreki, gestablídni hevur verið stórt, og tey bæði hava verið tiltikin fyri góða urtagarðsrøkt.

Diamantbrúdleypsdagurin verður hildin leygardagin klokkan 16 við vælkomst veitslu í Betesda, har tey bæði eiga teirra fasta pláss.

## Jógvan Sofus Ferjá 90 ár

Tá eg í farna mánaði kom framvið einum manni, ið stóð og loysti flag, ella velti, sum eisini verður sagt, var eg varugur við, at tað var Ferjá, sum vit vanliga nevna Jógvan Sofus. Eg fór yvir til hansara, og vit fingu eitt gott prát. Millum annað spurdi eg hann, hvussu mong árini vóru blivin, og fekk eg at vita, at hann var føddur 10. apríl 1913, t.v.s. at hann fyllir 90 ár í dag. Jógvan Sofus sigldi í mong ár og róði út. Hann arbeiddi m.a. á Nordafar í Føroyingahavnini í Grønlandi. Hann giftist við Kristinu Sofía, f. Christiansen, eisini frá Gjógv, vanliga nevnd Dinnefía. Tey eiga 5 børn, ein son og 4 døtur. Dinnefía og Jógvan Sofus kundu halda krúndiamantbrúdleyp 3. desember í fjør. Eydnu við degnum Jógvan Sofus og tær verður ynskt eitt gott lívskvøld.



*Jógvan Sofus Ferjá. Myndin er tikin 20. mars í ár*

**Heilsan ein kenningur**

## Brúdleyp!

Leygardagin 12. apríl giftast Nanna Joensen og David Lukama í Chililabombwe í Sambia. 21. apríl er opið hús á Ryggsvegi 5 í Klaksvík frá kl. 17.00.

## Dagurin

10. apríl. Ezekiel. Ein av teimum fýra stóru profetunum í Gamla testamenti. Navnið merkir: Gud er sterkur

## Jóanes Nielsen 50 ár



Leygardagin 5. apríl, fylti skaldið Jóanes Nielsen 50 ár. Jóanes Nielsen hevur havt stóran týdning fyri føroyskan skaldskap og samfelagskjakið tey seinastu 24 árini. Hann hevur ikki bara havt stóran týdning fyri føroyskar bókmentir, eisini hevur hann, eins og onnur stór skøld, havt stóran týdning fyri einstaklingar - eisini meg.

Meg minnist, tá ið eg fyrst las yrkingasavnið "Trettanda mánaða". Eg var júst farin um fermingaraldur. Bókin við fórsíðu úr gróti og tí sermerkta tittulinum, hevði staðið á hillini heima hjá mammu og pápa mínum í nøkur ár. Eg tók hana av hylluni av og á, hugdi at henni og setti hana upp á pláss aftur. Ein dagin, og tá hevði eg hugsað um tittulin leingi, setti eg meg niður og las bókina. Eg varð so bitin av hesum universinum, hesum ærligu og rámandi orðunum, at eg fekk ikki lagt bókina frá mær aftur. Tá var ikki so lætt at fáa fatur á bókum. Bókasavnið á Sandoyar Meginskúla var ikki so bókaríkt, heldur ikki vóru so nógv yrkingasøvn har. Tað, sum var at lesa á bygd var "Varðin" og skaldsøgurnar, sum Bókagarðurin gav út.

Eftir at eg hevði lisið "Trettanda Mánaða" umaftur og umaftur, skaffaði eg mær, so hvørt sum bøkurnar hjá Jóanesi komu út, allar hinar.

Tað gingu eini 8 ár áðrenn eg møtti Jóanesi fyrstu ferð. Tað var í 1992. Eg arbeiddi í barnagarðinum "Vípan", har Katrin, dótturin hjá honum og Rannvá gekk. Vit bygdu spæliplássið, sum har er. Síðani hava vit prátað og hitst javnan. Maðurin var akkurát so sum bøkurnar, ið hann skrivaði, søgdu hann skuldi vera - ærligur og rámandi í orð og tal. Ein maður, sum altíð hevur virt tann arbeiðandi mannin, men sum ongantíð hevur foraktað vitan á nakran hátt. Einaferð segði hann mær, at hann fyrstu ferð hoyrdi um týska heimsspekingin Nietzche í lastini á einum fiskiskipi. Jóanes hevur altíð ferðast millum fólk, sum hava havt eina holla vitan um lívsins gongd, og hevur altíð drigið til sín søgur um fólk, sum onnur kanska ikki halda eru fólk, í eftir samfelagsnormum eru "stovurein", men sum Jóanes altíð hevur virðismett hægri enn, ja, bókmentir. Sum skald hava Jóanes og Magnus Dam Jacobsen víst fólki, at tað kann lata seg gera at skriva talumál, at bókmentir ikki eru innpakkað páskaregg, sum hava ligið ov leingi í sólini. Hetta hevur altíð hugtikið meg, og eg veit um ungdómar, sum kanska ikki hava lisið í nógv ár, tí at onki er sum fangar teir, og tá ið teir so hava lisið eina yrking hjá Jóanesi, so síggja teir, at tað er gjørligt at brúka eitt mál og at skriva á ein hátt, at ongin kennir seg sum eina fornleivd.

At vimerkja nútíðarsamfelagið, hevur altíð verið eitt av eyðkennum Jóanesar. Greinarnar hann hevur skrivað eru savnaðar í fleiri bókum. Skaldsøgurnar og yrkingarnar eru lagdar sum tokskinnarar inn í tann føroyska heilan. Seinast, men ikki minst, sjónleikurin "Eitur nakað land weekend", sum Jóanes vann norðurlenska dramatikkaravirðislønina fyri. Ein leikur, sum lýsir eina uppgerð við tjóðskaparromantikkin og persónligar marrur, ið leikararnir hava.

Nú Jóanes er 50 ár, er hann vorðin ein havnarmynd. Helst hevur hann verið tað í longri tíð. Vit síggja hann øll fyri okkum: Boygdur framyvir, við hondum aftan bak, eygleiðir alt, sum gongur fyri seg í nánd. Fyrsta mei, tá ið hann veiftrar við reyðum flaggi út gjøgnum vindeygað í arbeiðskamari sínum. Nú hevur hann fingið sær ein appelsinlittan skutara við hvítum kassa á viðførisberaranum, og myndin er vorðin eitt sindur fjølbroyttari. Jóanes er ein fjølbroyttur maður. Hann hevur fingist við alt handaligt arbeiði, og sum skald hevur hann eisini roynt seg innan nærum allar sjangrur. Hann er ein eygleiðari, ein heimseygleiðari. Listamálarin Barnett Newman segði einaferð: at fuglar duga ikki sum ornitologar.

Tað verður altíð ynskt fólki eitt langt og gott lív. Jú, jú, gaman í, men frægari er um ein fær eitt langt og breitt lív. Við hesum fáu orðum vil eg ynskja tær Jóanesi, hjartaliga tillukku við teimum 50 árunum, og somuleiðis ynskja tær og familju tíni eitt framhaldandi langt og breitt lív.

**Oddfríður Marni Rasmussen**